TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN



# søkir eftir lærara

Talan er um fast starv á:

- **Maskindeildini**

**Vit vænta, at tú hevur:**
- sveinabræv innan økið
- evni og hegni at arbeiða við ungdómi
- viðkomandi starvsroyndir
- hollan og dagførdan kunnleika innan økið

Fyrimunur er, um tú hevur víðari útbúgving og teldukunnleika.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv, saman við royndum starvsfeløgum
- møguleika fyri dagføring og eftirútbúgving innan økið
- løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

**Tú:**
- skal senda umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndum innan 21. juni 2007 til:

  **Tekniska Skúlan í Tórshavn**
  Postrúm 3239,
  110 Tórshavn

Um tú vilt vita meira um starvið, kanst tú venda tær til:

**Helga Mortensen,** deildarleiðara á maskindeildini tlf. 308050

Starvið, sum umfatar undirvísing av maskinsmiðum og SIT-næmingum, skal setast 9. august 2007. Fyrstu 2 árini eru royndartíð, har tú, sum settur/sett verður í starv, má vera til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg námsfrøðiliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur/sett í fast starv.

**Maskindeildin** tekur sær av undirvísing av maskinsmiðum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 6 lærarar og ein verkvørður

Eisini undirvísa lærararnir á eftirútbúgvingarskeiðum og í ávísan mun víðari útbúgvingum, sum skúlin hevur.

# Starvsfólk til Starvsmannafelagið

**Starvsmannafelagið søkir eftir starvsfólki til umsiting felagsins at byrja eftir avtalu.**

**Uppgávu:**
Starvsmannafelagið er í holtur við at menna felagið og sóknast tí eftir fólki, ið við ágrýtni og fakfelagsanda skal røkja áhugamál felagsins og verða viðspælari hjá nevnd og tæna limum felagsins. Tú kemur at starvast í umsiting felagsins og eisini taka lut í dagliga umsitingarliga arbeiði felagsins. Høvuðsdentur verður lagdur á uppsøkjandi arbeiði, tiltøk í húsum okkara og vera við til at stinga út í kortið framtíðarhugsjónir felagsskapi okkara at gagni.

**Førleikar:**
Vit leita eftir einum starvsfólki við kunnleika til og áhuga fyri fakfelagsarbeiði, ið eisini hevur góð samstarvsevnir og hevur lætt at samskifta. Kravt verður, at tú megnar at arbeiða sjálvstøðugt og undir trýsti.

Fyrimunur er at hava umsitingarligar royndir, góðan teldufórleika, umframt góðan kunnleika til enskt.

**Setanartreytir:**
Starvið er fulltíðarstarv, við møguleika fyri niðursettari arbeiðstíð. Vit bjóða eitt livandi og avbjóðandi starv við menningarmøguleikum, har tænasta og limarøkt er í hásæti.

Starvið verður sett og lønt eftir sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknin skal vera Starvsmannafelagnum í hendi 1. juli 2007. Merkið brævbjálvan: **Umsókn**. Meira fast at vita um starvið við at venda sær til Gunnleiv Dalsgarð, formann felagsins á tlf. 314868.

**Starvsmannafelagið**
**J.H. Schrøtersgøta 9**
**Postboks 165**
**110 Tórshavn.**

**Starvsmannafelagið** er stórsta fakfelag á almenna arbeiðsmarknaðinum við uml. 1900 limum, sum starvast í teimum 4 sáttmálaøkjum felagsins, Fíggjarmálaráðnum, Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya, S.E.V og Føroya Tele (Føroya Arbeiðsgevarafelag), felagið hevur í dag tilsamans 116 álitisfólk á arbeiðsplássunum innan sáttmálaøkini. Starvsmannafelagið gevur út Starvsblaðið og hevur umframt kunning á heimasíðu felagsins www.starvsmf.fo. Í umsiting felagsins starvast formaður og skrivari felagsins.

Skúlin á Ziskatrøð
Postboks 53 · FO-700 Klaksvík

# Lærarastørv í Skúlanum á Ziskatrøð

**Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2007:**

- 4 lærarar í fast starv.
- 2 lærarar í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008 fyri lærarar í farloyvi.
- 1 lærari í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008 at lesa avlopstímar.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og er fyrikomandi
- eru nærlagdir og stundisligir.

**Lærararnir skulu hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum:**
- føroyskt, søgu/samtíð, tónleik, støddfrøði, enskt, týskt og danskt.

**Førleikakrøv:** Lærarаútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Lønar- og setanartreytir:** Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í Lønarflokkunum 18.1- 27.4.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi seinast mikudagin 20. juni klokkan 12.

Í skúlanum á Ziskatrøð verða komandi skúlaár umleið 380 næmingar frá 1. – 10. flokk.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Skúlan á Ziskatrøð telf. 455025 (skúlastjórin), 444386 (Signar á Brúnni, skúlastjóri) ella telf. 443192 ( Ólav Sjúrðarberg, varðaskúlastjóri).



# LOYSNIN!

**...ein lykil til alt húsið, virkið ella skúlan !!**

**Vit loysa lás- og lyklatrupulleikar.**

**Vit eru serkønir í at gera:**

Ruko systemlás · Skipan av lásum
Umvælingar · Skera lyklar til · Umskipa

**TÓRSHAVNAR LÁSASERVICE**
v/Jahn Petersen
**TEL 310 411 · FARTEL 215 411**
teldupostur: lasasmid@post.olivant.fo

# MASKINFØRARI

Søkt verður eftir maskinførara,
at byrja beinanvegin.

Samtakið
**Hansen & Jakobsen**
Tlf. 211643 · 210471

SVN Síldarvinnslan hf

# Maskinmaður

Maskinmaður søkist til Snæfugl SU-20, laksabrunnbátur í Skotlandi og Noreg.

Báturin sær gott út og lastar uml. 12.000 laksir. Motorurin er 1300 hk og 957 kw.

Áhugaði kunnu venda sær til:

**Sildarvinnslan hf.**
Hafnarbraut 6 · Neskaupstaður · Ísland
T-postur: hakon@svn.is · Tel 00 354 895 9909
www.svn.is